# ítróttur

Nr. 140 • týsdagur • 26. juli 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Tað bilti ikki hóast ÍF kom sær í óføri

**B68 megnaði ikki hugflogið, sum skuldi til fyri at venda gongdini, hóast teir í meiri enn ein tíma vóru fleiri á vøllinum enn fuglfirðingarnir, sum vístu góðan hugburð, vóru tað**

B68-ÍF HÁLVFINALA LØGMANSSTEYPIÐ

*Jóannes Hansen*

Tað var undan dystarbyrjan í góðveðrinum á Svangaskarði púra opið, um tað skuldi verða ÍF ella B68, sum skuldi spæla finaluna ímóti GÍ.

ÍF endaði omaná. Teir vunnu 1-0 og harvið samantalt 3-1. Toftamenn høvdu bóltin kanska 80 prosent av tíðini, men teir megnaðu ikki tað, sum er alneyðugt í fótbólti, nevniliga at spæla seg til málmøguleikar og at gera mál.

Tað gjørdi ÍF. Eftir at B68 fyrstu løtuna einar tríggjar ferðir hevði verið nær við, eftir at sera væl upplagdi Øssur Hansen var brotin ígjøgnum í vinstru og hevði lagt innfyri, skoraði ÍF í fyrsta álopinum, sum teir høvdu. Eftir fínt álop, sum varð sett í gongd aftarlaga í høgru og spælt diagonalt og tvørtur um aftur, legði Atli Petersen innfyri úr høgru, og Bartal Eliasen, sum fyrstu løtuna var í álopinum saman við Sylla, tveitti seg fram um verjuna við nærra stólpan og stútaði hegnisliga í netið.

So tóktist mótbrekkan serliga tung hjá toftamonnum, sum við dystarbyrjan høvdu verið aftanfyri við einum máli. Men tað slætnaði hjá teimum í 22. minutti. Eftir framlegging eftir miðásinum rætti miðverjin Poul Ennigarð hondina upp og steðgaði bóltinum, sum annars hevði kós ímóti Jóhan Peturi Poulsen, sum var á veg at gerast púra leysur. Dómarin fór í reyvalumman, og so vóru fuglfirðingar undirmannaðir.

Fríspark sstøðan bar horna til B68 við sær. Tað fingu teir einki burturúr. ÍF fór í skjótálop, og teir fingu so stóran møguleika at økja um leiðsluna, sum tað ber til. Sylla og Atli Petersen vóru einsamallir við einum verjuspælara. Sylla tøvdi eitt sindur í høgru, áðrenn hann legði framvið verjuspælaranum og inn til Atla Petersen, sum ikki fekk stundir at smekka til, áðrenn hann varð takladur.



*Atli Petersen hjá ÍF og Fabriocio Borges dystast um bóltin. ÍF vann sær sæti í eini steypafinalu fyri fyrstu ferð síðan 1987, tá kappast varð um Ísafjarðasúluna*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Gamla søgan

Næstu fimm korterini myndaðust, sum spælið so ofta hevur gjørt, tá ið annað liðið hevur mist ein mann. Bartal varð fluttur aftur í ÍF miðverjuna, og Sylla lá einsamallur har frammi og dyrgdi eftir kontramøguleika.

B68 royndi og royndi, men tað eydnaðist teimum ikki at fáa mál. Teir høvdu fleiri hornaspørk, og eftir innlegg var tað fleiri ferðir nær við og næstan. Men Tórður Thomsen, sum tykist vaksa við uppgávuni í ÍF málinum, helt tætt, og tað var heilt sjáldan - um tað var nakrantíð - at hann varð settur á stórvegis royndir. Hann hevði sjálvsálit, hann var tryggur í brotsteiginum, og hann sparkaði langt, og toftamenn megnaðu ikki at gera honum lívið serliga trupult.

Fyri at skapa málmøguleikar, tá ið annað liðið er undirmannað og noytt at pakka seg saman, er neyðugt at toga spælið í borðini og harfrá at leggja innfyri, og at samanspæla skjótt og tætt í brotsteiginum. B68 royndi báðar uppskriftirnar, men teir megnaðu ikki at fáa tað burturúr, sum skuldi til.

ÍF helt tætt. Á sentrala miðvøllinum stríddist og vann Høgni Zachariassen nógvar nærdystir. Tað var smeitur, tá ið arbeiðshesturin Eyðolvur Petersen orsaka av skaða noyddist at gevast, men avloysarin Hanus Eliasen, sum serliga hevur dygdir frameftir, megnaði væl sín leiklut, sum nú var at hjálpa til í verjuspælinum.

Símun Eliasen og Bartal Eliasen vóru bestir í luftkrígnum og høvdu roynd irnar, sum skuldu til, tá ið teirra lið var undir trýsti. Rúni Elttør og Áki Petersen røktu sínar ódnir í borðunum, og Atli Petersen og Eyðun Ryggshamar tuskaðu nógv í borðunum. Emil Nolsøe Leifsson vísti síni góðu evni, tá ið hann varð settur inn, og hóast hann leingi hevur verið illa skaddur, so vísti Bárður á Lakjuni lítlu løtuna, hann var á vøllinum, at fótbóltsevnunum bilar einki.

## FAKTA

**B68-ÍF 0-1 (0-1)**
**0-1:** Bartal Eliasen 13.
Dómari: Georg N. Rasmussen
**B68:** Albert Sævarsson - Alex Troleis, Ovi Magnussen, Bogi Petersen, Øssur Hansen - Kristian Anthon Andreassen (Øssur Jacobsen, 65.), Eyðstein Skipanes, Jann Ingi Petersen, Fabricio Borges (Jóhan Dávur Højgaard, 83.) - John Petersen, Jóhan Petur Poulsen
**Gult kort:** Jóhan Petur Poulsen, Øssur Hansen, Eyðstein Skipanes, Øssur Jacobsen
**ÍF:** Tórður Thomsen - Áki Petersen, Poul Ennigarð, Símun Eliasen, Rúni Elttør - Atli Petersen, Eyðolvur Petersen (Hanus Eliasen, 62.), Høgni Zachariassen, Eyðun Rygshamar (Emil Nolsøe Leifsson, 57.) - Bartal Eliasen, Amed Sylla (Bárður á Lakjuni, 88.)
**Gult kort:** Bartal Eliasen, Atli Petersen
Reytt kort: Poul Ennigarð 22.
ÍF samantaldur vinnari og í finaluna við málmuninum 3-1.

# ÍF skal hava nýggja miðverju

**Poul Ennigarð og Bartal Eliasen eru leikbannaðir, tá ið ÍF fyri fyrstu ferð skal royna seg í finaluni um Løgmanssteypið**

ÓLAVSØKUFINALAN

*Jóannes Hansen*

Við 1-0 sigri á Toftum sunnudagin tryggjaði ÍF sær fyri fyrstu ferð nakrantíð pláss í steypafinaluni. Seinast ÍF var í finaluni var í 1987, tá ið fuglfirðingar taptu ímóti HB.

ÍF hevur ongantíð luttikið í altjóða fótbólti. Um tað eydnast fuglfirðingum at vinna á grannunum úr Gøtu á Ólavsøku, so fer ÍF at eiga rættin at spæla í UEFA Cup næsta ár. Uttan mun til hvussu tað annars fer at ganga hjá teimum í landskappingini.

- Hetta kennist sum stór avbjóðing hjá okkum øllum. Vit fara at venja eina ferð á Svangaskarði, og so hava vit fingið loyvi at fara á Tórsvøll eina løtu ólavsøkuaftan, aftaná at B36 og ÍBV hava spælt, sigur Petur Simonsen, venjarin hjá ÍF.

Fyritreytirnar hjá fuglfirðingum undan finaluni versnaðu ikki sørt á Svangaskarði sunnudagin. Tá ið 22 minuttir vóru farnir, fekk miðverjin Poul Ennigarð, reytt kort fyri at taka upplagdan málmøguleika frá B68. Hann nýtti hondina. Poul hevur spælt í bestu deildini í mong ár. Hann hevur bara eina ferð áður fingið reytt kort. Tað var í landskappingardystinum ímóti KÍ herfyri. Tá fekk hann leikbann í tríggjar dystir. Sunnudagurin var tann fyrsti, sum Poul fekk loyvi aftur at vera við. Nú er greitt, at hann verður leikbannaður í finaluni.

Tá ið tað restaðu sjey minuttir av fyrra umfarinum fekk Bartal Eliasen gult kort. Hann var byrjaður í álopinum og hevði skorað ÍF málið og var farin aftur í miðverjuna, tá ið Poul var rikin av vøllinum.

Hetta var triðja gula kortið hjá Bartali í steypakappingini, og so er hann leikbannaður í finaluni. Reglurnar fyri Formuladeildina siga, at fimm gul kort skulu til, áðrenn spælari verður leikbannaður. Í steypakappingini eru gomlu reglurnar galdandi, sum siga, at hamarin fellur eftir trý gul kort. Sambært heimasíðuni hjá FSF hevur hann fingið kort í báðum hálvfinalunum ímóti B68 og eisini, tá ið ÍF í fjórðingsfinaluni vann 1-0 á HB í Gundadali.

- Eg haldi tað vera sera harmuligt, at vit skulu vera tveir profilar fyri uttan. Serliga harmuligt er tað, at Bartal fekk gula kortið í støðu, sum eftir mínum sjónarmiði als ikki var til gult kort. Heldur kendist tað sum um, at dómarin júst hesa løtuna kanska kendi seg eitt sindur kroystan, heldur ÍF venjarin Petur Simonsen.

Fyrr í ár var Jonn Thomsen í ÍF miðverjuni. Hann hevur leingi verið skaddur, og hann verður ikki við í finaluni. Annar av miðverjunum verður Símun Eliasen. Spurningurin er so, hvør fer í hitt plássið. Áki Petersen

Stríðsmaðurin á miðvøllinum, Eyðolvur R. Petersen, noyddist av vøllinum í 2. hálvleiki, men í ÍF rokna teir við, at hann verður tøkur fríggjadagin.

Petur Simonsen rósar sínum spælarum fyri góðan hugburð, tá ið tað stóð tóktist skula standa á, eftir at teir høvdu mist ein mann.

ÍF hevur seinastu dagarnar fingið tveir nýggjar spælarar. Emil Nolsøe Leifsson er leigaður frá HB. Hann spældi síðsta stóra hálva tíman mitt á ÍF miðvøllinum ímóti B68.

Málverjin Jacob Kaas hevur seinastu dagarnar vant við ÍF, og avtala er gjørd við spælaran. Hann hevur spælt í Svendborg. Hann hevur røtur í Grønlandi, og hann var í myndini til landsliðið hjá teimum, sum var á Oyggjaleikunum, men hann rakk akkurát ikki ímillum teir kosnu.

**Plásstrot**

Vegna plásstrot í dagsins blað var ikki pláss fyri øllum ítróttartilfarinum. Restin av tilfarinum verður í blaðnum í morgin.